# Tilboð í heyst

**Atlantic Airways fer í heyst at bjóða nakrar bíligar ferðir**

TILBOÐ
*Heri á Rógvi,*
*heri@sosialurin.fo*

Seinnu árini hava føroyingar fingið møguleikan at keypa bílígari flogferðaseðlar ein part av árinum. Soleiðis verður eftir øllum at døma eisini í heyst. Enn er endaliga loyvið ikki givið, men roknað verður við, at tilboðið verður veruleiki.

Kostnaðurin verður 1.867 krónur fyri vikuskiftisferðaseðlar og 2.367 fyri sokallaðar Super Apex ferðaseðlar. Afturat hesum prísum skulu leggjast avgreiðslugjald. Av marknaðardeildini hjá Atlantic Airways verður upplýst, at ætlanin er, at prísirnir skulu vera galdandi árið út. Neyðugt verður ikki á hesum sinni at ferðast tvey saman.

Sølutreytirnar verða tær somu sum við Apex ferðaseðlum. Tað vil siga, at ferðaseðlarnir skulu bíleggjast eina viku undan fráferð og ferðaseðlarnir kunnu ikki broytast.

## Code-share

Atlantic Airways hevur gjørt eina samstarvsavtalu við Maersk-Air. Hetta er ein sokallað code-share avtala. Handan heitið býr tann týdningur, at tað fer at verða møguligt at keypa ferðaseðlar til eitt nú Nice úr Føroyum frá Maersk-Air, har Atlantic flýgur ferðafólk fyrsti teinin til Danmarkar. Hvørjir prísir verða galdandi er ikki greitt enn, men Magni Arge, stjóri fyri Atlantic Airways, sigur, at keypararnir fáa góðar treytir. Maersk-Air flýgur til nógv ferðamál í serliga suður Evropa úr bæði Keypmannahavn og Billund. Á skrivstovuni hjá Maersk-Air í Føroyum kunnu tey ikki upplýsa nakað, hvørjir prísir verða galdandi. Somuleiðis er ikki greitt, hvussu verður hjá fólki, har tað restar í at fáa fimm súlur hjá Maersk.

Magni Arge:

# Ivasamt við bonusskipanum



*Magni Arge verður eisini flogbossurin á Føroyarutunum, og tað tekur hann sum eina stóra avbjóðing.*

**Prísirnir verða í fyrstu atløgu ikki hækkaðir, og í heyst verða nýggj bílig tilboð. Men bæði Eurobonus og Súluskipanin yvirliga valla**

FLOGFERÐSLA
*Heri á Rógvi,*
*heri@sosialurin.fo*

Tað fær í fyrstu atløgu ongar avleiðingar á prísin á vanligu ferðaseðlunum, at Maersk-Air gevst við at flúgva til Føroya.

Hetta sigur stjórin fyri Atlantic Airways, Magni Arge. Síðani Atlantic byrjaði at flúgva í 1988 hevur felagið allatíðina kappast við Maersk-Air. Men nú hevur felagið monopol á loftvegis ferðslu til og úr Føroyum.

Magni Arge leggur eina við, at Atlantic Airways fer at halda sama tænastustøði sum áður. Í fyrstu atløgu verða fráferðirnar hjá Maersk lagdur afturat skránni hjá Atlantic. Hetta fer at merkja, at Atlantic Airways fer at flúgva tvær ferðir um dagin til Keypmannahavnar í vetur. Enn er so lítið fráliðið, síðani tað endaliga kundi staðfestast, at Maersk-Air gevst við sínari flúgving til Føroya 31. oktober. Hetta ger, at Magni Arge ikki kann siga so nógv ítøkiligt um longri framtíðarperspektiv. Men fyrstu tíðina og helst eisini longur fram í tíðini verður ikki minni kapasitetur. Á Føroya-rutunum.

Sum tað kann lesast aðrastaðni á síðuni, so fer Atlantic at bjóða tilboðsprísir í heyst.

Í høvuðsheitum heldur Magni Arge, at hendan støðan er ein stór avbjóðing fyri Atlantic Airways, og teir ætla at gera nógv fyri at halda verandi tænastustøði.

## Bert ein bonusskipan

Kappingin á Føroya-rutunum hevur millum annað merkt, at í fjør kom ein nýggj bonusskipan, har ferðandi hvørja sættu ferð fingu ein ókeypis ferðaseðil. Samstundis er Atlantic Airways við í Eurobonus skipanini hjá SAS. Hendan skipan umfatar onnur flogfeløg í Star Alliance, og kemur tað serliga væl við hjá fólki, ið ferðast víðari út í heim. Fyri ferðandi, ið at kalla bert ferðast millum Vágarnar og eitt nú Kastrup, gevur hendan skipan ein ókeypis ferðaseðil eftir seytjan ferðir á rutunum hjá Atlantic, um so er, at ein ikki keypir ein fult broytiligan ferðseðil.

Magni Arge heldur ikki, at tað er nakað serligt høpi í at varðveita tvær bonusskipanir.

- Eingin avgerð er tikin enn, men eg havi ongantíð hildið, at tað riggar væl við tveimum skipanum, sigur Magni Arge. Hann ásannar, at framtíðin við tveimum bonusskipanum er ivasom. Men eingin endalig avgerð er tikin.

Síðst í hesum mánaðinum verður nevndarfundur í Atlantic Airways, og eftir tann fundin roknar Magni Arge við, at tað verður greitt, hvussu verður við bonusskipan og øðrum viðurskiftum.

Enn er ikki alt komið upp á pláss millum Maersk-Air og Atlantic Airways. Eitt nú spurningurin um, hvussu verður við bonusskipanini hjá Maersk er ikki komin upp á pláss.

## Spara

Í løtuni starvast eini hundrað fólk hjá Atlantic Airways. Magni Arge roknar við, at hetta tal mestur fer at økjast til eini í øllum førum 115 fólk, nú felagið skal økja um sítt virksemi. Maersk-Air átti eini 35-37 prosent av ferðafólkum millum Føroya og Danmark. Hetta svarar til eini 50.000 fólk, ið Atlantic nú ístaðin skal flúgva.

Við monopol støðu ber til hjá Atlantic at fremja fleiri sparingar.

- Vit kunnu fáa eina betri javnvág millum vetur og summar, og tað verður kanska lættari hjá okkum at skipa okkum. Men samtundis skulu vit eisini innrætta okkum at flúgva fleiri túrar og økja um virksemi, sigur Magni Arge.

Í vetur verður ikki neyðugt hjá Atlantic Airways at nýta fleiri flogfør enn tey trý, felagið eigur í løtuni. Men Magni Arge sigur, at tað kann gerast neyðugt í komandi summar at fáa til vega eitt flog afturat.

## Stuðla framhaldandi

Atlantic Airways hevur verið ein av føstum stuðlunum í føroyskum ítrótti og til mentanartiltøk. Við ongari kapping, er tað kanska ikki so týdnigarmikið hjá føroyska flogfelagnum at marknaðarføra seg og stuðla. Spurdur um hesa nýggju støðu, sigur Magni Arge:

- Eg havi ikki hugsað so nógv hatta, men eg haldi, vit hava ein áhuga í at gera tað liviligt í Føroyum, sigur Magni Arge.

Í løtuni verður samráðst við FSF um eina nýggja stuðulsavtalu, og har roknar Magni Arge við, at Atlantic framvegis fer at stuðla.

## SAS vísir áhuga

Við blaðið Børsen sigur, at stóri flogfelag SAS heldur, at tað kundi verið spennandi at flúgva til og úr Føroyum. Susanne Larsen, stjóri í SAS, sigur við Børsen, at metir felagið Føroya rutuna vera ein góðan handil, so vil SAS fara inn á hetta økið.



# Stjórarnir vistu av ongum

**Klokkan 9.30 fríggjamorgunin fingu sjónvarps- og útvarpsstjórin at vita, at stovnarnir skulu leggja saman. Og Mikkjal Helmsdal kann frá 1. januar 2005 ikki kalla seg stjóra longur**

LOFTMIÐLAR
*Heri á Rógvi*
*heri@sosialurin.fo*

Sjónvarp Føroya og Útvarp Føroya skulu eftir ætlan leggja saman frá 1. januar 2005. Hesum boðaði Mentamálaráðið frá í tíðindaskrivi um ellivu tíðina fríggjamorgunin. Klokkan 9.30 vóru Mikkjal Helmsdal, sjónvarpsstjóri, og Jógvan Jespersen, útvarpsstjóri, kunnaðir um hesa avgerð. Teir siga báðir, at avgerðin kom óvart á teir.





*Hvørki Mikkjal Helmsdal ella Jógvan Jespersen kendu nakað til, at SvF og ÚF nú skulu leggjast saman*

## Ikki longur stjóri

Mikkjal Helmsdal kann frá 1. januar 2005 ikki longur kalla seg sjónvarpstjóra. Hann sigur seg ikki vera uppsagdan, og hann heldur onga orsøk vera, at tað liggja persónligar orsøkir aftanfyri. Mikkjal Helmsdal verður ikki stjóri fyri nýggja samanlagda stovnin. Ì skrivandi stund veit Mikkjal Helmsdal ikki at siga, hvat fyri starv, ætlanin er, at hann skal røkja.

Um samanleggingina sigur sjónvarpsstjórin, at hann upp á longri sigt dugir at síggja nakrar fyrimunir.

– Eg eri rættiliga ivasamur, um hetta er rætta løtan at leggja stovnarnar saman.

Fíggjarligi trupulleikarnir hjá sjónvarpinum verða ikki endaliga loystir av hesi orsøk, sigur Mikkjal Helmsdal.

Tað undrar sjónvarpsstjóran stórliga, at politiski myndugleikin ikki hevur ráðført seg hjá stovnunum sjálvum.

Fríggjamorgunin boðaði sjónvarpsstjórin sínum starvsfólkum frá avgerðini, og hann sigur, at tey vóru rættiliga skelkaði, tá tey fingu boðini.

Ætlaða samanleggingin ger, at ætlaðu umskipanirnar hjá Sjónvarpi Føroya verða steðgaðar.

– Tað gevur onga meining at umskipa nakrar mánaðir undan, at stovnurin skal leggja saman við øðrum stovni, sigur Mikkjal Helmsdal.

Hetta merkir millum annað, at ætlanin við at senda Danmarks Radio óviðgjørt verður løgd á hillina.

Mikkjal Helmsdal vil ikki gera viðmerkingar til, um hann ætlar at halda fram í starvi á nýggja samanlagda stovninum.

## Tað er tað

Útvarpsstjórin hevur ikki so nógvar viðmerkingar til samanleggingina.

– Tað er ein politisk avgerð, sum er tikin. Tað er tað, sigur Jógvan Jespersen. Hann heldur, at tað eigur at geva góðar møguleikar fyri at rationaliserað, soleiðis sum landsstýrismaðurin hevur stungið út í kortið, og tað eigur at geva betri møguleikar. Men útvarpsstjórin hugsar fyrst um at varðveita verandi støði á sínum stovni.

– Vit mugu ansa eftir, at Útvarp Føroya heldur verandi støði, og vit eisini menna SvF.

Inntil víðari heldur Útvarp Føroya fram at virka sum vant.

# Frí kapping loftvegis í Føroyum

**Arbeiðið at liberalisera loftvegis ferðasambandi í Føroyum er byrjað. Bjarni Djurholm hevur lagt málið fyri landsstýrið, og um tveir ár roknar hann við, at tað verður frí prísáseting í Føroyum**

FLOGFERÐSLA
*Heri á Rógvi*
*heri@sosialurin.fo*

Bjarni Djurholm, landsstýrismaður í loftferðslumálum, hevur lagt eitt mál fyri landsstýrið um at frígera loftferðslu kappingina í Føroyum.

Landsstýrismaðurin væntar sær at fáa stuðul til at gera kappingina fullkomiliga fría á loftferðslu marknaðinum í Føroyum.

Landsstýrismaðurin sigur seg rokna við, at tað ganga eini tvey ár, áðrenn ætlanin verður til veruleika. Hetta skyldast, at tingingar skulu vera bæði við Danmark og ES. Ætlanini er nevniliga, at Atlantic Airways eisini skal kunna njóta sama frælsi uttanlands sum onnur feløg vilja kunna fáa í Føroyum.



*Tað verður frí kapping á Føroya rutunum um tvey ár, metir landsstýrismaðurin í loftferðslumálum*

## Flótandi prísir

Innan ES verður »Open Skyes« nýtt. Hetta merkir, at tað stendur øllum frítt at flúgva og seta teir prísir einum ynskir. Í Føroyum er støðan langt frá tann sama. Tað eru donsku loftferðslu myndugleikarnir, ið góðkenna allar prísir á ferðaseðlum. Tað tekur tretivu dagar at viðgera tílíkar umsóknir, ið eru á borðinum hjá Vinnumálaráðnum og venda.

Í juni kom ein umsókn um at fáa »flótandi« prísir á Føroya-rutunum. Hendan umsóknin er ikki liðug viðgjørd enn. Bjarni Djurholm sigur, at Atlantic Airways fyrst skuldi hava møguleikan at gera viðmerkingar. Nú Maersk-Air hevur tikið avgerð um at gevast, so heldur Bjarni Djurholm ikki tað vera so nógv høpi í umsóknini.

– Men vit høvdu viðmælt umsóknini, sigur Bjarni Djurholm.

Bert tvey feløg hava loyvi at flúgva til Føroya. Frá 31. oktober er eitt tílíkt loyvi tøkt hjá øðrum at søkja. Í skrivandi stund frættist ikki um nakra umsókn.

## Spell

Tað er fatanin hjá landsstýrismanninum, at tað ikki kemur væl, at Maersk-Air hevur valt at gevast at flúgva til Føroya.

– Tað er spell. Kapping er tað besta fyri brúkaran, sigur Bjarni Djurholm.

Hann heldur ikki, at landsstýrið eigur at fáa skyldina fyri avgerðina.

– Avgerðin, sum Maersk hevur tikið, hevur einki við okkum at gera. Føroya rutan hóskar ikki til nýggja bygnaðin hjá Maersk, sigur Bjarni Djurholm.

Hann er greiðir yvir, at leikluturin sum eigari av Atlantic og myndugleiki ikki hóskar væl saman í hesum døgum, har marknaðirnir støðugt verða meira opnir.

– Tað almenna eigur ikki at vera partur av vinnulívinum, men umstøðurnar við loftvegis fluttningi eru so serligar, at vit hava hilda tað verið best at halda fram við verandi skipan. Men í framtíðini er tað lætt at ímynda sær, at aðrir eigarar taka yvir, sigur Bjarni Djurholm.

## Magni við uppá tað

Stjórin fyri Atlantic Airways, Magni Arge, er av teirri áskoðan, at tað er gott hugskot at frí kapping verður um flutning loftvegis til og úr Føroyum.

– Vit hava sagt við Vinnumálaráðið, at vit viðmæla at latið verður upp fyri fríari kapping í Føroyum, sigur Magni Arge.

Ynskið hjá Atlantic og Magna er, at kunnu onnur flogfeløg koma til Føroya at flúgva, so vil føroyska flogfelagi eisini sleppa at hava rætt til at royna seg á øðrum evropeiskum leiðum, sum felagið hevur hug at royna.